## Ikki slept upp á fjall

**Roynt verður nú at finna útvegir fyri at Suðuroyingar og sandoyingar fáa vørur, hóast ætlanin mánakvøldið varð steðgað**

VERKFALL
*Áki Bertholdsen*

Enn er vón fyri, at tað fer at eydnast at suðuroyingum og Sandoyingum at fáa neyðsynjarvørur.

Sum tað sæst í grein aðrastaðni í blaðnum, varð royndin mánakvøldið at flyta ymsar matvørur, og aðrar neyðsynjarvørur í Sandoynna og Suðuroynna, steðgað.

Men Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðskvinnufelag, halda framvegis, at tað er skeivt, at summi øki eru fyri vanbýti og at tað ikki skal bera til at flyta vørur til Sandoynna og Suðuroynna. Tey vísa til, at allur flutningur slapp at ganga ótarnaður í nakrar dagar, frá tí at løgreglan hevði ruddað vegbyrgingarnar í farnu viku, til blokadurnar vórðu tiknar upp aftur mánanáttina. So á meginlandinum eru allar handilshillar á tremur.

Ingeborg Vinther sigur tískil, at hóast fyrsta royndin at fáa vørur í Suðuroynna og Sandoynna, miseydnaðist mánakvøldið, fer ein roynd at verða gjørd afturat.

– Vit fara einaferð enn at royna at finna útvegis fyri, at suðuroyingar og sandoyingar kunnu fáa neyðsynjarvørur suður.

Hon sigur, at enn veit hon ikki, hvussu hetta kann skipast.

– Men tað er greitt, at tað skal verða undir skipaðum viðurskiftum, so at allur flutningur ikki sleppur at ganga ótarnaður, sigur Ingeborg Vinther.

# Ongir serfrøðingar skulu upp í verkfallið

**– Verkfallið snýr seg ikki um prosentir men um prinsippir, siga Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðskvinnufelag**

VERKFALL
*Áki Bertholdsen*

Tað skulu ongir óheftir roknimeistarar upp í verkfallið.

Tað er greitt, eftir at Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðskvinnufelag hava víst i uppskotinum frá arbeiðsgevarunum aftur um at fáa óheftar serfrøðingar at roknað út, hvussu stórur munur er á lønunum hjá limunum í verkfalli og hjá limunum í Havnar Arbeiðsmannafelag og feløgunum í Klaksvík.

Í sáttmálunum, sum nú eru farnir úr gildi, hava feløgini í verkfalli fingið onkrar viðbøtur, sum hini arbeiðarafeløgini ikki fáa. Men nú semingsuppskotið varð lagt fyri tey, var ætlanin, at lønin skuldi vera tann sama hjá øllum pørtum.

– Góðtóku vit semingsuppskotið, høvdu vit samstundis sostatt eisini góðtikið, at vit skulu fáa eina minni lønarhækking, enn feløgini í Klaksvík og Havnar Arbeiðsmannafelag hava fingið, siga feløgini í verkfallið. Tey siga, at munurin er 2,5%.

Arbeiðsgevarin hava víst hesum aftur og siga, at munurin er einans 0,13%.

– Tað er ongin meining í at ósemja skal vera um útrokningargrundarlagið. Hinvegin hevur tað týdning at staðfesta veruleikan, halda arbeiðsgevararnir. Tí hava teir skotið upp, at teir, og feløgini í verkfalli, velja hvør sín óheftan serfrøðing at gera hesar útrokningar fyri partarnar. Sjálvir valdu arbeiðsgevararnir beinanvegin Jógvan Amonsson, grannskoðara, sum sín serfrøðing.

### Nei takk

Men hetta uppskotið halda feløgini í verkfalli lítið um og tey gjørdu beinanvegin greitt, at tey fóru ikki at velja nakran serfrøðing at rokna nakað út fyri partarnar.

– Vit vita ikki rættiliga hvat endamálið er, tí halda tit, at tað hevur nakað sum helst við arbeiðssteðgin gera, hvussu nakrar viðbøtur verða roknaðar út, hava tit misskilt okkurt grundleggjandi, hava arbeiðsgevararnir fingið at vita frá feløgunum í verkfalli.



*–Vit hava staðfest, at Arbeiðsgevararnir hava givið Havnar Arbeiðsmannafelag og feløgunum í Klaksvík tilsøgn um, at vit skulu ikki fáa somu lønarhækkingar, sum tey hava fingið og tað er eitt prinsipp, sigur Vígdis Johannesen, formaður í Havnar Arbeiðskvinnufelag*

Vígdis Johannesen, formaður í Havnar Arbeiðskvinnufelag, sigur, at orsøkin til verkfallið er, at arbeiðsgevararnir vilja ikki samráðast um samráðingaruppskotið hjá feløgunum í verkfalli.

– Hinvegin er tað staðfest, at arbeiðsgevararnir hava givið einum triðja parti, sum onki hevur við samráðingarnar at gera, tilsøgn um, at vit skulu ikki fáa meiri í løn enn hesin triði partur hevur fingið og tað kann als ikki góðtakast. Hesin triði partur, sum hugsað verður um, er Havnar Arbeiðsmannafelag og feløgini í Klasvík.

– Fyri okkum er tað eitt prinsipp, at mótpartur okkara ikki brýtir avgerandi fyritreytina fyri einari og hvørjari samráðing, nevniliga at partarnir frítt kunnu samráðast um tey krøv, sum hin parturin leggur fram.

– Og tá ið arbeiðsgevarin hevur bundið seg til ikki at kunna samráðst um lønarkrøv okkara, so duga teir helst at síggja, at tað eru teir, sum hava skyldina av samráðingarslitinum, sum førdi til henda arbeiðssteðg, sigur Vígdis Johannesen.

Hon skilir heldur ikki, hví arbeiðsgevararnir nú tvíhalda um, at øll skulu fáa somu løn.

– At lønin ikki er tann sama, er onki nýtt. Í nógv ár fekk Havnar Arbeiðsmannafelag 1% meiri í løn, enn vit fingu og tað mátti tvey verkføll til, áðrenn vit vunnu tað innaftur, sigur Vígdis Johannesen.

# Feløgini í verkfalli: Nú skemta arbeiðsgevararnir

**Arbeiðsgevararnir hava blokerað fyri at suðuroyingar og sandoyingar fáa varu. Hetta má vera skemt halda Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðskvinnufelag**

VERKFALL
*Áki Bertholdsen*

– Nú eru suðuroyingar og sandoyingar tiknir til gísla í verkfallinum.

Hetta er niðurstøðan hjá Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðskvinnufelag eftir tað, sum er farið fram hesar seinastu dagarnar.

Ætlanin var at suðuroyingar og sandoyingar skuldu setast javnt við landið annars. Og tá ið løgreglan tók vegbyrgingarnar burtur, so at farmur hevði frítt at fara ´æa meginlandinum, gjørdu feløgini í verkfalli av, at undantaksloyvi eisini skuldi gevast til at flyta varu til Sandoyar og Suðuroyar.

Men talan var bara um at geva tí einu heilsøluni, Poul Hansen, loyvi at flyta vørur suður. Feløgini í verkfalli siga, at hetta er fyri at hava tamarhald á, hvørjar vørur blivu fluttar, so at vørur til ídnaðarlig endamál ikki eisini fór at vera fluttur.

– Poul Hansen hevur deild í Suðuroy, so tað er sjálvsagt, at tað verða teir, sum býta vørurnar út til handlarnar, sigur Ingevborg Vinther

Men nú talaði Føroya Arbeiðsgevarafelag at. Tað vildi ikki góðtaka, at tað bara var ein ávís heilsøla, sum slapp at flyta vørur suður. Tað er avlagandi, sigur arbeiðsgevarafelagið.

– Antin verður fríur vøruflutningur fyri øll, ella skal ongin flutningur vera yvirhøvur, gjørdu arbeiðsgevarafelagið greitt. Teirra uppskot var, at fríur vøruflutningur skuldi t.d. onkran ávísan dag.

### Skemt

– Hetta má vera skemt.

Tað siga arbeiðarafeløgini í verkfalli í eini viðmerking til málið.

Tey gera púra greitt, at tað verða ikki arbeiðsgevararnir, sum sleppa at gera av, hvørji undantaksloyvi verða givin í verkfallinum, ella, hvussu verkfallið annars verður fyriskipað.

Sostatt er ongin vara enn sloppin til Suðuroyar ella til Sandoynna. Flutningurin, sum skuldi vera sunnukvøldið, varð steðgaður og støðan er við at verða álvarslig á nógvum økjum og heilt nógvar neyðsynjarvørur eru uppi í Sandoynni og í Suðuroynni.

– Hetta tiltakið taka vit sum eina roynd hjá arbeiðsgevarunum at stýra tiltøkunum og at øsa fólk.

Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðskvinnufelag meta nú, at Arbeiðsgevararnir - Føroya Arbeiðsgevarafelag - hevur tikið Suðuroynna sum gísla.

Arbeiðarafeløgini meta støðuna soleiðis, at fyrst vórðu tey trýst í verkfall, men at nú vilja arbeiðsgevararnir nú sleppa at stýra tiltøkunum. Í farnu viku fingu arbeiðsgevararnir hjálp frá løgregluni at fullføra henda setning.

– At arbeiðsgevararnir nú nokta vøru at koma í ávísar partar av landinum er óivað liður í at øsa fólk og at venda tey ímóti arbeiðarafeløgunum í verkfalli halda Føroya Arbeiðarafelag og Havnar arbeiðskvinnufelag.

# Løgreglan fylgir væl við verkfallinum

**Løgreglan fylgir so væl við gondini í verkfallinum, at leiðslurnar í feløgunum í verkfalli kenna sg forfylgd**

VERKFALL
*Áki Bertholdsen*

Tað er ongin ivi um at løgreglan fylgir serstakliga væl við gongdini í verkfallinum, ikki minst, har vegirnir eru avbyrgdir.

Men at teir fylgja so væl við, sum teir gera, er kortini komið óvart á leiðslurnar í feløgunum í verkfallið.

Ingeborg Vinther, formaður í Føroya Arbeiðarafelag, sigur, at tey hava løgregluna í hølunum á sær, hvar í tey so fara.

Antin koyrir løgreglan aftaná okkum, ella stendur hon ymsastaðni á vegnum ímillum Havnina og Kollafjørð, og eygleriðir tað, sum fer fram, Teir eru bæði í løgreglubilum og í vanligum bilum.

Tað er eisini komið fyri, at løgreglan steðgaði einum hýruvorgni, sum koyrdi verkfalsvaktir til Kollafjarðar. Hýruvognsf´ørarin varð spurdur, hvat hann hevði við hetta at gera.

– Eg havi verið í arbeiðsørindum, var svarið- og meiri varð ikki gjørt við tað málið

–Vit føla okkum sum ein brotsmenn. Men eg veit ikki, hvørji brotsverk, vit hava framt, leggur hon afturat.

Enn hevur løgreglan kortini ikki lagt uppá verkfallið, síðani vegirnir aftur vórðu byrgdir av mánanáttina.





*Pláss er ikki fyri næmingum við serligum tørvi í dagsins fólkaskúla í Føroyum. Skúlaleiðarar og umsiting eru samd um, at orsøkin er skeiv raðfesting frá politiska myndugleikanum*
*Modellmynd: Jens Kristian Vang*

# Veikir næmingar offraðir í sparingum

**Orsakað av ov lítlari játtan hevur fólkaskúlin ikki ráð at undirvísa veikum næmingum. Til komandi skúlaár hevur skúlin bert fingið játtað umleið helmingin av neyðugu tímunum til serligan tørv. Skúlaleiðarar og umsitingin eru samd um, at politikarar raðfesta skúlan alt ov lágt**

FÓLKASKÚLIN
*John Johannessen*

Næmingar við serligum tørvi skulu ikki vænta sær neyðugu frálæruna komandi skúlaár.

Orsøkin er, at politiski myndugleikin ikki tekur spurningin í nóg stórum álvara og vil játta tann pengingin, sum frálæran til hesar næmingarnar kostar.

Tørvurin á eyka frálærutímum til næmingar við serligum tørvi er komandi skúlaár 2.527 tímar. Men orsakað av ov lítlari játtan, fáa veiku næmingarnir tilsamans einans góðar 1.100 tímar býttar ímillum sín.

### Vánalig støða

Hans Eli Dahl, sum er settur leiðari fyri Sernámsdepilin, hevur ábyrgdina av at býta tímar út til ávísu næmingarnar við serligum tørvi á ymsu fólkaskúlunum kring landið. Hann metir støðuna hjá veiku næmingunum vera vánaliga. Tí næmingarnir fáa orsakað av lága tímatalinum ikki tey tilboð, teimum tørvar.

Skipanin er soleiðis, at serlærarar kring landið árliga senda umsóknir til Sernámsdepilin um neyðugu frálærutímarnar til hvønn einstakan næming. Tað vil siga, at tímarnir verða játtaðir persónliga til einstaka næmingin við serligum tørvi.

– Í ár hava vit fingið sera væl gundaðar umsóknir um 2.527 tímar. Men eftir at hava hugt tær gjølla ígjøgnum og vigað kriteriini, eru vit komin niður á 2.217 neyðugar tímar. Men vit hava einans ráð at býta út góðar 1.000 tímar. Tað vil siga, at vit bara mugu skera ígjøgnum við flossutum kriterium, sigur Hans Eli Dahl.

### Ov lítil heildarjáttan

Orsøkin til vánaligu støðuna hjá veiku næmingunum er kortini ikki bert tann, at játtanin til sertímar er ov lág. Hans Eli Dahl á Sernámsdeplinum og Hensar Ellingsgaard, deidarstjóri fyri fólkaskúlan í Mentamálastýrinum, eru samdir um, at sjálv heildarjáttanin til fólkaskúlan er ov lág.

Verandi skipan er soleiðis, at allir skúlar fáa 0,11 tímar um vikuna fyri hvønn næming til serundirvísing. Tað vil siga, at ein skúli við 200 næmingum fær 200 ferðir 0,11 tímar, sum er tað sama sum 22 tímar um vikuna, sum teir kunnu nýta til vanliga serundirvísing. Hetta er serundirvísing til næmingar, ið krevja serundirvísing í eitt styttri tíðarskeið. Til dømis kunnu slíkir tímar nýtast til eitt lesiskeið í nakrar vikur ella okkurt líknandi.

Teir heilt tungu næmingarnir við serligum tørvi fáa sínar tímar játtaðar frá Sernámsdeplinum. Og tað eru hesir tímar, ið pengar ikki eru til komandi skúlaár. Men orsøkin til hetta hongur saman við, at skúlarnir fáa ov lítið av peningi játtaðan til aðrar tímar.

### Ónd ringrás

– Av tí, at skúlarnir fáa ov fáa tímar til onnur øki, verða teir ofta noyddir at taka burtur av vanligu serundirvísingini til bókasavnstímar og annað. Hetta ger so, at tørvurin á tímum frá okkum verður størri. Men um skúlarnir ikki taka burtur av serundirvísingtímunum til onnur øki, so vantar í har, vísir Hans Eli Dahl frá Sernámsdeplinum á.

Tí heldur Hans Eli Dahl, at einasta loysning at betra um viðurskiftini er at geva fólkaskúlanum eina størri heildarjáttan.

– Játtanin til serligan tørv er í dag 12 milliónir. Men um vit fingu tríggjar milliónir afturat, og skúlarnir fingu eina størri heildarjáttan, so hevði borið til, sigur Hans Eli Dahl.

Hensar Ellingsgaard, sum er deildarstjóri fyri fólkaskúlan í Mentamálastýrinum er samdur. Hann vísir á, at støðan er óhaldbar, og at orsøkin er vantandi vilji frá politiska myndugleianum at játta fólkaskúlanum pening.

– Fólkaskúlin verður raðfestur ov lágt, sigur deildarstjórin og vísir á, at tá tað fyri stuttum varð søkt um eykajáttan á 8,6 milliónir til fólkaskúlan fyri at viga upp ímóti lønarvøkstri, vórðu einans 4,5 milliónir játtaðar.

Hvørki Hans Eli Dahl ella Hensar Ellingsgaard kunnu lova, at nakað hendir, ið betrar um støðuna komandi skúlaár.

Lítla játtanin til skúlarnar er ein avleiðing, sum stendur við av kreppuni frá nítiárunum. Hóast samfelagið er komið fyri seg aftur, vil politiski myndugleikin framvegis hava játtanirnar at vera lágar, eru Hans Eli Dahl og Hensar Ellingsgaard samdir um.

## Verkfallið hevur kosta mær 30.000 krónur

**– Ingeborg siktar skeivt, tá útjaðarin verður blokkeraður. Hon skuldi heldur lagt ein ring kring Havnina og Klaksvík. Vit missa bara pengar, sum vit skulu liva av í vetur, sigur Milson Berg, formaður í Tvøroyara Útróðrarfelag**

Jústinus Leivsson Eidesgaard

4. mai var seinastu ferð hann avreiddi og nú hevur báturin ligið á Tvøroyri, hóast veðrið hevur verið at tí besta og hetta er besta tíð hjá útróðrarbátum í Suðuroy. Tað nyttar ikki at loysa, tí verkfall er og Milson sleppur ikki av við fiskin. Hann tekur blaðið frá munninum í dag og talar vegna limirnar í Tvøroyrar Útróðrarfelag, sum hann er formaður fyri.

Milson er dugnaligur útróðrarmaður sum fer víða eftir fiskinum, hann rør norðanfyri og hann rør sunnanfyri, hann er har fiskurin er, men nú sleppur hann ikki at loysa.

– Hetta er beiskt, tí vit eru í bestu tíð her hjá okkum, og tann fiskur, vit skuldu avreitt nú er neyðugur fyri at klára veturin, tað er tað vit liva av. Ingeborg rakar skeivt, tí hon tekur grundarlagið hjá okkum fyri restini av árinum, sigur Milson Berg.

– Menn, sum rógva einsamallir við báti, hava mist eini 30.000 síðan verkfallið byrjaði, og tað er nakað sum merkist, sigur Milson.

– Vit útróðrarmenn eru sera ónøgdir við verkfallið, tí vit halda, at Ingeborg loypir har garðurin er lægstur við at raka útjaðaran. Verkfallið hjá henni munar einki her. Tað er í Havn og í Klaksvík, at ein blokada veruliga hevði munað, har gongur alt jú sína vanligu gongd, sigur Milson Berg.

– Lat meg sláa fast, vit í útróðrarfelagnum hava einki móti verkfalli og vit halda eisini, at tað var skeivt at løgregluni at leggja upp í í Kollafirði, men vit halda, at Føroya Arbeiðarafelag eigur at ansa betur eftir ikki at raka sínar egnu ov meint við verkfallinum. Eg haldi eisini, at hini fakfeløgini áttu at víst Føroya Arbeiðarafelag meira samhuga. Tað var ikki for nógv, um eitt nú Starvsmannafelagið fór í samhugaverkfall, sigur Milson Berg.

# Fáa ikki fyrireika skúlaárini

**Orsakað av, at Sernámsdepilin má brúka tíð uppá at skerja talið av sertímum til fólkaskúlarnar, fáa skúlaleiðarar ov seint tímatalið at vita. Hetta ger, at teir ikki fáa lagt skúlaárið til rættis**

FÓLKASKÚLIN
*John Johannessen*

Fyrsta mars skuldu allir skúlaleiðarar sambært reglugerðini fáa at vita, hvussu nógvar sertímar skúlin fær til komandi skúlaár.

Hetta er ásett í reglugerð, fyri at tað skal bera til hjá skúlaleiðarum og lærarum at leggja komandi skúlaár til rættis í góðari tíð.

Men enn hava skúlaleiðararnir ikki fingið skrivligt at vita, hvussu nógvar sertímar, skúlin fær. Hetta ger, at teir illa fáa lagt eitt gott skúlár til rættis.

Niels Nattestad er leiðari fyri Venjingarskúlan í Havn. Hann er farin at leggja tímatalvuna fyri næsta skúlaár til rættis. Men arbeiðið er steðgað upp, tí hann hevur ikki vitað, hvussu nógvar sertímar hann fær, og tískil hevur hann heldur ikki vitað, hvussu nógvum lærarum, hann hevur brúk fyri.

Eftir at hava rykt hjá Sernámsdeplinum fekk Niels Nattestad mánadagi eina munnliga tilsøgn um, hvussu nógar tímar hann fær. Men av tí, at tilsøgnin er munnlig, torir hann ikki at leggja skúlaárið til rættis eftir henni.

– Hendan støðan er óhaldbar. Hetta er triðja árið á rað, at vit ikki fáa tímatalið at vita. 15 september skulu allir lærarar lata inn eina ársætlan fyri komandi skúlaár. Men hesa ætlan fáa teir ikki gjørt, tá vit ikki fáa tímatalið at vita, sigur Niels Nattestad.

Skúlastjórin fyri Venjingarskúlan heldur, at trupla støðan hongur saman við, at politiski myndugleikin als ikki raðfestir fólkaskúlan.